# – Eg havi eitt vanligt lív

**- Tað var eitt sindur strævið at byrja við í nýggja arbeiðinum. Eg hevði eitt sindur ilt við at skilja hinar, og hinir at skilja meg. Men eg haldi allíkavæl, at tað gekk sera gott, sigur Ásmund Reyðberg úr Klaksvík, sum hevur verið deyvur tey seinastu 34 árini**

DEYVLEIKI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Hann kennir ikki til annað enn at vera deyvur – hin 36 ára gamli Ásmund Reyðberg úr Klaksvík.

Síðani hann var 1 1/2 ára gamal hevur hann ikki hoyrt eitt einasta orð. Men hetta hevur ikki forðað honum í at hava fingið eitt innihaldsríkt lív sum deyvur í tí føroyska samfelagnum.

Hann hevur gingið í skúla. Hann hevur arbeitt á flakavirki. Hann hevur fingið sær útbúgving sum timburmaður – og hann hevur í dag fast arbeiði, kamar í býnum og er haraftrat forlovaður við eini gentu, sum býr í Danmark.

Tey møttust fyrstu ferð fyri 1 1/2 ári síðani, og hava tey dagligt samband hvør við annan, hóast bæði eru deyv.

– Hvussu vit samskifta? Jú, tað er við at brúka tøknina, sum nútíðin hevur givið okkum – gjøgnum eitt web-camera. Uttan tað, hevði tað ikki verið so lætt, sigur hann.

Ásmund arbeiðir dagliga hjá Litaval á Hjalla, har hann hevur ábyrgdina av málingagoymsluni. Og skal ein trúgva starvsfelagum hansara so er hann bæði røkin og dugnaligur í arbeiðinum.




*– Eg eri altíð við, tá Norðoya Sparikassi hevur ábyrgdarafund, sigur Ásmund*

## Praktisk linja

Ásmund er føddur í Klaksvík og er eisini vaksin upp har. Hann hevur kortini ikki altíð verið deyvur.

Fyrsta hálvtannað árið var hann hoyrandi, meðan síðani hvarv hoyrnin, og tí varð neyðugt hjá honum at fara á dagstovn í Havn.

Hetta var ein serstakur dagstovnur fyri deyv børn, og har var hann saman við fýra øðrum, ið høvdu sama likamliga brek sum hann.

Tá skúlagongdin byrjaði í 1. flokki fór Ásmund ikki í vanligan barnaskúla, men byrjaði á Skúlanum á Trøðni – tað sum í dag eitur Sernámsdepilin.

Eftir skúlagongdina í Føroyum lá leiðin til Danmarkar, har tey deyvu hava ein skúla – Castberggård Højskole – har góðir møguleikar vóru at fáa kunnleika til nógv ymisk ting.

– Har vóru fýra ymiskar linjur, og eg valdi so at fara á ta praktisku linjuna.

– Her gjørdu vit alt møguligt – vit plantaðu trø, plantaðu blómur, gjørdu gøtur og so gjørdu vit eisini snikkaraarbeiði. Tað dámdi mær sera væl, sigur Ásmund.

## Viðarlund í Kunoy

Eftir at skúlatíðin var liðug flutti hann aftur til Klaksvíkar, har hann byrjaði at leita sær eftir onkrum arbeiði.

Tað eydnaðist honum eisini, og fekk so arbeiði á einum av flakavirkjunum í býnum í eina tíð.

– Men eg hevði kortini hug at royna okkurt annað - okkurt praktiskt.

– Og soleiðis gekk tað til, at eg kom í læru sum timburmaður hjá Klaksvíkar Byggivirki tey fýra árini frá 1988 til 1992, sigur Ásmund.

Hetta vóru buldralig ár fyri tann føroyska búskapin, og tá hann so var útlærdur sum timburmaður í 1992 var ikki gjørligt hjá honum at halda fram í fyritøkuni.

Sum so mong onnur gjørdist hann tí arbeiðsleysur, men hann flutti kortini ikki av landinum eins og onnur vórðu noydd at gera.

Ásmund gavst ikki so, men royndi alla tíðina at fáa sær arbeiði. Hetta var ikki so lætt, tí vánirnar fyri búskapin vóru ikki av teimum bestu beint tá.

Men eydnan var við honum: Mamman fekk fatur á góðum og røttum fólki, og soleiðis bar tað til, at Ásmund kom við í tiltakið "Ung í arbeiði".

Hann hevði frammanundan ávíst samband við Kunoyar bygd, og tað var júst í hesi bygdini at brúk var fyri arbeiðshugaðum ungdómi.

Her var kommunan í ferð við at hampa um viðarlundina í bygdini, og hevði tí brúk fyri trimum ungdómum at arbeiða har ísenn eitt ávíst tíðarskeið.

– Eg var her í tríggjar mánaðir, og mær dámdi hetta arbeiðið sera væl, sigur Ásmund, sum jú frammanundan hevði verið í líknandi arbeiði á háskúlanum í Danmark.

## Ein ordans maður

Hetta arbeiðið í viðarlundini í Kunoy fekk so ein enda, men enn var líka trupult at finna sær nakað fast arbeiði.

Ásmund gekk tískil arbeiðsleysur í eitt ár, til hann at enda var so heppin at fáa arbeiði á Kósavirkinum ein vetrardag í 1993. Og her var hann so í samfull sjey ár, fram til ársenda í 2000.

Hann søkti tá eitt arbeiði sum goymslumaður í málingini hjá Litavali á Sandvíkahjalla, og har er hann enn í fullum starvi.

Hetta arbeiðið á høvuðsgoymsluni innan máling hjá stóru fyritøkuni er at taka ímóti ordrum um máling frá hinum deildunum kring landið og síðani fáa teir avgreiddar skjótt og væl.

Hetta arbeiðið krevur sín mann og at viðkomandi hevur ordan í systeminum. Og er tað nakað, sum sermerkir hansara arbeiði á Litavali, so er tað ordan, siga hini starvsfólkini um hann.

## Dugdu teknmál

Nú var fyritøkan ikki heilt óvon við deyv fólk, tí ein annar deyvur – Hermundur Zachariassen – hevur í mong ár starvast í Málingahandlinum.

Fyri Ásmund sjálvan var hetta ein stór gleði, men tað var ikki altíð so lætt í fyrstuni.

– Nei, tað var eitt sindur strævið at byrja við. Eg hevði eitt sindur ilt við at skilja hinar, og hinir at skilja meg.

– Men eg haldi allíkavæl, at tað gekk sera gott, sigur hann.

Tíbetur fyri Ásmund dugdi onkur av starvsfelagum hansara eitt sindur av teknmáli longu tá. Og í dag duga fleiri teirra meiri enn eitt sindur av teknmáli.

Ein annar fyrimunur var, at ein drongur, sum arbeiddi í Málingahandlinum dugdi nakað væl av teknmáli.

– Tað var Hermundur sum hevði lært hann hetta. Og fyritøkan var so beinasom at bjóða honum arbeiði her uppi á Sandvíkarhjalla, soleiðis at vit kundu ar-